P/F ALMA
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA
Munters
THE HUMIDITY EXPERT

Munters produktini avfukta kølirúm, frystirúm og aðrar goymslur, produktiónshølir, teknikkrúm, turkirúm, garagur, loftsrúm og kjallarar við kondensrupuleikum, eins og onnur hølir har fukt ella kondens kann gera skaða, ella eitt turrari umhvørvi er eitt ynski ella krav.

Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn
Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00 – mail: henrik@alma.fo



TASKI ...mest seldu gólvvaskimaskinur
SWINGO 750/1250B



A.H.Jensen
TEL 322676

# Spøkilsishøvundarnir funnir

**Sólrún Michelsen og Sámal Kristian Jacobsen vunnu kappingina hjá Bókadeildini um at skriva spøkilsissøgu til børn**

RITHØVUNDAKAPPING
*tíðindaskriv*

Fyrst í desember skrivaði Bókadeild Føroya Lærarafelags út kapping um at skriva spøkilsissøgu til 9-12 ára gomul børn. Endamálið er at vera við í stórari norðurlendskari bókaútgávu við nýggjum spøkilsissøgum, sum hava støði í gamlari frásøgumentan. Í savninum verða 8 norðurlendsk forløg umboðað við einari ella tveimum søgum hvørt.

33 søgur komu inn til kappingina, og Bókadeild Føroya Lærarafelags fegnast um stóru undirtøkuna. Nógvar søgur eru góðar, so tað var ikki lætt at velja burturúr. Men havandi í huga, at søgurnar ætlaðar 9-12 ára gomlum børnum, máttu fleiri sáldast burturfrá, tí tær venda sær til ung.

Dómsnevndin samdist um tvær søgur: "Óvitar" eftir Sólrún Michelsen og "Spøkilsi, spøkilsi" eftir Sámal Kristian Jacobsen.

Hesar søgur eru rættiligar ólíkar, men eru báðar heilskapaðar og hóska væl til aldursbólkin. Avdúkað verður ikki, hvussu søgugongdin er, men báðar eru sum vera man um tað yvirnatúrliga, onnur meira stillfør og innilig, hin við meira aktión og humor. Og báðar eru tær nútíðarligar.

Umframt at vinnararnir fáa eina virðisløn á kr. 7.500 hvør, sleppa teir saman við forlagsfólki á ráðstevnu í Reykjavík eitt vikuskifti fyrst í apríl, har úrvaldu søgurnar frá ymsu londunum verða umrøddar og betraðar saman við bókmentafólkum, ið eru serkøn í júst hesum bókmentaslag. Miðað verður eftir bókaútgávu á øllum norðurlendsku málunum heystið 2006 í øllum Norðurlondum samstundis. Hvørt land finnur eitt listafólk at myndprýða sínar søgur.

Sum nevnt komu so nógvar frálíkar søgur inn, at Bókadeildin ætlar at geva út eitt savn til ung og annars øll, ið hava hug at lesa spennandi søgur. Í næstum fer dómsnevndin at velja einar 10 - 15 søgur burturúr, og síðan fer forlagið at seta seg í samband við høvundarnar, ið eiga hesar søgurnar, og greiða teimum frá ætlanunum.

ENDABRESTUR!
Nú er seinasta freist at stovna breiðband fyri

0,- kr. *)

Stovnar tú I-net Breiðband Privat frá Føroya Tele áðrenn 28. februar, geva vit tær stovningina púra ókeypis.

Seinasta freist er 28. feb. Spar 750,-

Við breiðbandi frá Føroya Tele fært tú nógv skjótari og støðugt fast internetsamband. Og so kanst tú eisini tosa í telefon, samstundis sum tú ert á netinum.

Føroya Tele hevur 3 ymisk hald at velja ímillum, ið øll eru gjørd til júst tín nýtslutørv. Og sjálvandi er hetta til kappingarføran prís har góð kundatænasta er ein sjálvfylgja.

Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...

I·net BREIÐBAND

*) Treytað av at tú teknar I·net privat breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 28. februar 2005. Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.

FØROYA TELE

petur & petur • 320870

Vit søkja
KT-fólk

fá nærri at vita á
www.farodane.fo

FARODANE
Brekkutún 4 - FO-100 Tórshavn - Tlf. 311414 - farodane@farodane.fo